UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn
Føroyar

Tórshavn, tann 21. apríl 2021
J.nr.: 21/01190-28
At tilskila í svari
Viðgjørt: GA

Viðv. løgtingsmáli nr. 108/2020 uppskot til løgtingslóg um at byggja umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið

Víst verður til § 1, stk. 2 í uppskotinum til løgtingslóg um at byggja umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið, har sagt verður, at útreiðslurnar til byggingina kunnu í mesta lagi vera 26,3 mió. kr. Hesin metti kostnaðurin av bygningum er endurtikin í viðmerkingunum, sí brotini 1.4 og 2.1.

Sum kunnugt var bygningurin í útboði, tá ið lógaruppskotið varð sent Løgtinginum.

Tilboðini komu inn til Landsverk síðst í mars 2021. Dómsnevndin, sum varð sett at meta um innkomnu tilboðini, hevði fund 14. apríl. Dómsnevndin skuldi meta um innkomnu tilboðini við støði í tillutanartreytunum, sum vórðu ásettar í útboðnum.

Tillutanartreytirnar, sum tilboðini skuldu metast út frá, vóru:

- Kostnaður 50%
- Virkisføri og arkitekturur 30%
- Bygnaður og tøkniligir førleikar 20%

Í útbjóðingartilfarinum varð kostnaðurin fyri bygning mettur til 20 mió. kr. og afturat hesum verða roknaðar góðar 6 mió. kr. til ymiskar meirútreiðslur, sí nágreining niðanfyri.

Dómsnevndin metti, at tilboðið frá Búsetur á besta hátt leyk treytirnar, sum vórðu settar í útbjóðingartilfarinum. Tilboðið frá Búsetur er á 23.779.651 kr.

Við støði í kostnaðinum hjá Búsetur á 23.779.651 kr. verða 6.429.789 kr. roknaðar afturat, íroknað kostnað í sambandi við fyrireiking av útboðnum, til tess at leggja upp fyri ávísum óvissum, t.d. meir-/minni veitingar, eyka avtalur og lønar- og prísvøkstur, fakeftirlit og innanhýsis ráðgeving og leiðsla v.m. hjá Landsverk, umframt samsýning til tilboðsgevarar. Nakrar útreiðslur, sum eru í teimum 6.429.789 kr., eru goldnar í 2018 (56.500 kr.) og í 2019 (393.849 kr.). Hesar útreiðslurnar skulu dragast frá karminum í verklagslógini. Samlaði fíggingartørvurin er hereftir 30.206.449 kr., frádrigið 450.349 kr. = 29.756.100 kr.

Í rundum tølum verður tí biðið um, at karmurin í verklagslógini § 1, stk. 2 hækkar við 3,7 mió. kr., úr 26,3 mió. kr. og upp í 30 mió. kr. Hetta merkir eisini at játtanin, sum er í ætlanini fyri 2022, skal hækkast úr 12. mió. kr. upp í 15, 7 mió. kr.

Vinarliga

Gunnleyg Árnafjall
fíggjarfulltrúi